TJÓÐVELDI

# Mítt hjartamál

Mítt hjartamál er, at ríkidømið í havinum verður umsitið sum varandi grundarlag undir føroyska búskapinum. Hesin politikkur skal vera lívfrøðiliga og búskaparliga sjálvberandi, og skal í gjøgnum lógina skapa tryggar karmar til vinnuna at arbeiða undir.

Síðani heilársøkisfriðingarnar og lógin um vinnuligan fiskiskap komu í gildi í 1994, hevur tað gingist væl við fiskarínum. Tí kann tað ikki vera nøkur skilagóð loysn at tosa um eina nýggja skipan í dag. Vit eiga heldur at rudda upp í verandi lóg.

Tað, sum øsir fólk upp ímóti hesi skipan, er tann søla, sum fer fram av fiskiloyvum til svimlandi prísir. Hetta kemur at gera, at fiskirættindini verða samlað á nakrar fáar hendur. Tað verða neyvan vanligir fiski- og útróðrarmenn, sum klára hesa kapping. Tað verða serliga strámenn fyri útlendsk áhugamál, sum fara at keypa fiskirættindini, og reka burtur av grunninum teir útróðrar- og fiskimenn, sum eiga skip og bátar sjálvir.

Um føroyingar vilja eiga nøkur fiskirættindir sjálvir, so má hetta óskilið steðgast nú!

## Heini O. Heinesen

www.tjodveldi.fo/heini

